gult18 cyan18 magenta18 svart18



# Fara altíð eftir gullinum

**Fyri flogbóltsfólkini er ongan tíð nakar ivi, tá farið verður á Oyggjaleikir. Tey dystast altíð fyri gullinum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Føroyskur flogbóltur hevur verið umboðaður, hvørja ferð Oyggjaleikir hava verið hildnir, og aloftast hevur hetta eisini verið við sera góðum úrslitum. Fyrstu heiðursmerkini komu longu á Isle of Man í 1985, og síðani hevur við einstøkum undantøkum altíð eydnast okkara kosnu at føra heiðursmerki við sær heimaftur.

## Verja gullið

Í so máta eru oyggjaleikirnir í ár einki undantak.. Bæði hjá kvinnum og monnum er talan um leikarahópir, sum á pappírinum síggja ógvuliga spennandi út, og í greinum í bløðunum hava umboð fyri liðini eisini klárt givið til kennar, at farið verður eftir gullinum.

Um tað er rætt ella ikki at tosa um favorittar, skal ikki verða tikin støða til her, men í hvussu so er kann staðfestast, at tá kvinnurnar fara á vøllin, er tað samstundis fyri at verja gullmerkini frá Gotlandi, og hetta er so í øllum førum nakað at liva upp til. Broytingarnar á kvinnuliðnum hava heldur ikki verið tær heilt nógvu í mun til ta ferðina, tó at onkur náttúrlig útskifting sjálvsagt hevur verið.



*Flogbóltskvinnurnar skulu hesa ferð verja gullmerkini, sum tær vunnu sær á Gotlandi*

The grand old lady í føroyskum flogbóli, Marjun Kalsø, er framvegis á liðnum, og gongst eftir ætlan kann hon taka eitt fitt petti ávegis teimum 100 dystunum, sum sigur seg ætla at røkka.

Umframt Marjuna er talan sjálvandi um fleiri aðrar sterkar leikarar, og ikki minst tykist hugaligt, at fleiri av leikarunum farnu árini hava spælt seg á elitulið í donsku flogbóltsrøðini. Nakað sum avgjørt átti at verið ein styrkur fyri liðið.

At liðið eisini er sterkt, framgekk millum annað av úrslitunum á venjingarleguni í Danmark herfyri. Tá eydnaðist kvinnunum at vinna á einum donskum elituliði, og megna tær framhaldandi at halda sama støði í spælinum, er lítið at ivast í, at føroysku kvinnurnar fara at standa sera frammarliga, tá avtornar.

## Kæran losyti seg

Í samband við kvinnulandsliðið kann annars nevnast, aein trupulleiki tók seg upp, tá bólkarnir til oyggjaleikirnir vórðu settir saman.

Í hesum hevur verið vanligt, at vinnarin og nummar fýra frá undanfarnu leikunum eru í einum bólki, meðan tvey'arin og trý'arin verða koyrd í sama bólk. Soleiðis varð tó ikki gjørt hesaferð, og úrslitið av hesum varð, at Føroyar komu í bólk saman við Saaremaa, sum vanliga er ein av harðastu kappingarneytum okkara.

Flogbóltssambandið gjørdi av at kæra bólkasamansetingina, og fyriskiparanir ásannaðu eftir hetta, at eitt mistak varð framt í styrkismetanini, og eftirfylgjandi vórðu bólkarnir broyttir, so Føroyar nú eru í bólki við Guernsey, meðan argastu kappingarneytarnir úr Álandi og Saaremaa eru í hinum bólkinum.

## Spennandi lið

Menninir vunnu bronsukrónurnar á Gotlandi, so í so máta er byrðan hjá teimum ikki eins tung at bera.Eitt annað, sum heldur ikki talar fyri, at liðið skal gera tær heilt stóru skreytirnar, er, at útskiftingin hevur verið hampuliga stór síðani ta ferðina.

Hinvegin er einki dulsmál, at núverandi landsliðshópurin tykist sera spennandi á at líta. Fleiri ungir og evnaríkir leikarar eru við í hópinum, og fyri aðrar er eisini galdandi, at teir hóast ein lutfalsliga ungan aldur longu hava vunnið sær drúgvar royndir í landsliðsflogbólti.

Eins og hjá kvinnunum hava eisini flogbóltsleikarar hjá monnunum vunnið sær pláss á sterkum donskum flogbóltsliðum farnu árini, og alt annað líka styrkir hetta um liðið.

Havandi unga miðalaldurin í huga er tó eitt sindur ilt at meta um styrkina hjá liðnum, men eitt tykist tó vist, og tað er at menninr ikki ætla sær verri úrslit enn bronsumerkið, sum varð vunnið á leikunum á Gotlandi.



*Menninir vunnu bronsu seinast, og hóast talan í ár er um ungt lið, so ætla teir sær ikki verri úrslit hesaferð*

## Heiðursmerki í Flogbólti á Gotlandi'99

Flogbóltur

| | | |
|---|---|---|
| Gull: | liðkapping | kvinnur |
| Bronsa: | liðkapping | menn |

## Landsliðshópurin, kvinnur

Guðrið Nolsøe
Alvilda Ólavsdóttir
Annika Joensen
Hjørdis Mortensen
Mariann Øster
Helen á Lakjuni Jacobsen
Gerda Nattestad
Tina Jacobsen
Helga Nordendal
Marjun Kalsø
Anna Müller Jacobsen
Margit Joensen

## Landsliðshópurin, menn

Suni Juul Pedersen
Rúni Weihe
Andrass Jógvansson
Steinar Eirikstoft
Heiðrikkur Bergsson
Høgni Viderø
Sigmundur av Teigum
Bárður Bendix Mikkelsen
Ragnar Petersen
Suni Hansen
Odd Eliasen
Bartal Eliasen

gult19 cyan19 magenta19 svart19



## Heiðursmerki í súkkling á Gotlandi '99

Súkkling
Silvur: Rogvi Johansen Landavegssúkkling

# Enn restar gullið



*Sverri Mohr Edvinsson*



*Jóhann Brend*



*Bogi Kristiansen*



*Jákup Johansen*



*Rógvi Johansen*



*Gunnar Dahl Olsen*

**Fleiri ferðir hevur verið nær við, men enn hevur tað ikki eydnast føroyskum súkklarum at vinna gull á Oyggjaleikunum**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*

Súkklingin í Føroyum tykist vera ein itrótt, sum hevur verið í stórari menning seinnul árini. Ikki minst hevur tað skapt ans, at teir báðir, Rógvi Johansen og Bogi Kristiansen, hava staðið seg stak væl í kappingum í Danmark, har Rógvi fyri stuttum enntá vann sær fyrstu stigini á altjóða styrkislistanum.

Hóast hetta, so hevur tað enn ikki eydnast føroyingum at vinna nakað gullmerki í súkkling á Oyggjaleikum, men eins og við flestu lutum, so hevur hetta kortini eina góða frágreiðing.

Tað er nevnliga soleiðis, at bæði Isle of Man og Saaremaa hava havt hvør sín sera sterka súkklara við á Oyggjaleikunum, og í øllum førum tær báðar seinastu ferðirnar hava hesir sett seg tungt á gullmerkini.

Hetta merki tó á ongan hátt, at Føroyar ongan møguleika hava havt, tá kappast hevur verið. Rógvi Johansen, sum uttan iva er sterkasti súkklarin hjá okkum, vann silvurmerki á oyggjaleikunum á Gotlandi, og áður hevur tað eisini eydnast liðnum at vinna heiðursmerki í landavegskoyring.

## Kenna ikki mótstøðuna

Tá vit frættu seinast, vistu føroysku súkklararnir enn ikki, hvørjir mótstøðumenninir á Isle of Man verða, og tískil er eisini ilt at gita um, hvørjar vónirnar til heiðursmerki eru.

Hava Isle of Man og Saaremaa sínar sterkastu súkklarar við, verður ivaleyst soleiðis, at hinir súkklararnir fara at kappast um silvurmerkini, men verða hesir ikki við, verður tosið eitt heilt annað.

Tá fer tað ivaleyst fyrst og fremst at snúgva seg um, hvørt tað endiliga skal eydnast føroyingum at vinna sær gull fyri fyrstu ferð. Sum sagt er størsta vónin helst knýtt at einkultstartinum hjá Rógva, har hann hevur tikið seg nógv fram síðani 1999, men eisini í liðkoyringini, har liðið er nærum hitt sama sum seinast, tykjast føroyingar at hava góð kort á hondini.

# Fjøðurin verður kanska lættari



*Bjartur Lamhauge*



*Guri Poulsen*



*Guðrun Jacobsen*



*Aksel Poulsen*



*Rani í Líð*



*Erland Poulsen*



*Ragnar Rasmussen*

**Møguleiki tykist vera til staðar fyri, at úrslitini hjá føroysku badminton leikarunum fara at verða betri í ár, hóast talan er um munandi minni luttøku á kvinnusíðuni**

BADMINTON
*Jákup Mørk*

Tá farið varð til Oyggjaleikirnar á Gotlandi skrivaðu vit her í Sosialinum, at talan var um mest óroynda badminton landslið, sum føroyingar nakran tíð høvdu sent avstað. Hetta var sjálvandi eisini nakað, sum ávirkaði úrslitini, og vit kunnu bert staðfesta, at Føroyar eingi heiðursmerki fingu í badminton á teimum leikunum.

## Færri konufólk

Royndir eru tó nakað, sum leikarar skulu arbeiða seg fram ímóti, og tað er tí hugaligt at staðfesta, at tað í stóran mun eru somu leikarar – nú við tvey ára drúgvari royndum – sum hesa ferð fara at umboða Føroyar á leikunum.

Vónirnar fyri heiðursmerkjum eru tí í nógv størri mun til staðar hesaferð, og talan tykist eisini vera um vónir á bæði harra- og kvinnusíðuni.

Fyri kvinnurnar var tað stórur smeitur í 1999 at Guðrun Jacobsen meiddi sær fótin, og tískil ikki kundi taka lut á leikunum. Hesa ferð telist Guðrun tó millum íðkararnar, og tískil kundi ein hildið, at kvinnusíðan er heldur sterkari í ár. Hinvegin eru Ingun Poulsen og Kristianna Thorkildshøj.ikki við á liðnum, sum í ár bert telvir tvey konufólk. Umframt Guðrun Jacobsen er talan um Guri Poulsen, og tær báðar vera so einsamallar á kvinnusíðuni. Ætlanin var annars, at Ingun skuldi vera við á liðnum, men hon hevur so givið avboð til ferðina.

Ætlandi skuldui seks mannfólk vera við á liðnum, men avmarkingin á Oyggjaleikunum sigur í mesta lagi fimm, og tí varð seinasti luttakarin sáldaður frá eftir úttøkuna.

## Hvat kann Ragnar gera

Á mannfólkasíðuni tykist størsti spenningurin vera um, hvussu stór framgongdin hjá Ragnari Rasmussen hevur verið, nú hann í eitt ár hevur gingið í skúla og vant í Danmark.

Í einmansleikinum eru vónirnar tó eisini hampuliga stórar til Erland Poulsen, so alt í alt tykist harrasíðan í badminton at síggja sera spennandi út, har talan eisini kann gerast um eitt gott úrslit í liðkappingini, um smálutirnir laga seg rætta vegin.

Tað er tó spell, at kvinnusíðan tykist so nógv viknað, tí hóast tað er ein styrkur, at Guðrun aftur er tøk, so vigar hetta ikki rættiliga upp ímóti, at tað í ár bert eru tvær kvinnur við á liðnum.